Anker Jørgensen, formaður í Norðurlanda Ráðnum:

Roknar við at Noreg verður limur í EF

— Eg rokni við at Noreg verður limur í EF. Noreg er partur av Europa, og øll europeisk lond koma at luttaka í EF-samarbeiðinum, sigur formaðurin í Norðurlanda Ráðnum og fyrrverandi forsætisráðharri Anker Jørgensen í samrøðu við norska blaðið Aftenposten.

Anker Jørgensen sigur, at hann gjørdist rættiliga bilsin, tá norðmenn í 1972 gjørdu av ikki at fara upp í EF.

— Øll lond, sum eru partar av Europa, vilja hava limaskap í EF, og er Noreg ikki ein partur av Europa? Tað er eingin ivi um, at Noreg eigur at vera ein partur av framtíðar samarbeiðinum í Europa, sigur Anker Jørgensen í sambandi við, at Norðurlanda Ráðið hevur havt setu í Keypmannahavn.

Hann imyndar sær, at bæði Noreg, Finland og Svøríki gerast limir av EF.

— Danmark hevur skjótt verið limur í 20 ár, og vit eru sera væl nøgdir. Ístaðin fyri at sita úti í gongini og bíða eftir at hini londini taka avgerðirnar, so vit hava meira eina kenslu av at vera við til at taka hesar avgerðir, sigur Anker Jørgensen við blaðið.

Hann heldur tað er sera umráðandi at norðmenn eru við í teimum avgerðunum, sum skulu takast í Europa á fleiri týðandi økjum, eitt nú um umhvørvi, sosialpolitikk og spurningin um menningina av vælferðarsamfelagnum.

Hvussu við teimum smáu í EF, spyr Aftenposten.

Anker Jørgensen: — Vit hava sæð ferð eftir ferð, at lond sum Holland, Belgia og Luxemburg hava kunnað gjørt seg galdandi í EF. Hvussu var ikki í Europa fyri síðsta heimsbardaga? Tá høvdu tey einki at siga, í dag eru tey við til at taka avgerðirnar.

Aftenposten hevur eisini oddagrein um spurningin. Blaðið dylur ikki fyri, at tað tekur undir við størri samarbeiði millum Noreg og EF. Blaðið heldur, at tað má vera endamálið hjá Norðurlondum at tosa við eini rødd eisini innanfyri EF. Blaðið heldur ikki, at Noreg eigur at standa uttanfyri EF, nú Svøríki gerst limur og heldur, at norski arbeiðaraflokkurin eigur at gera støðu sína til EF upp.


VALUTAKURSIR


		1.3	Ultimo síðsta mán.
USA	**Dollari** ..	590,00	583,20
Bretland	**Pund** ...	1121,55	1120,50
V-Týskland	**Markur** .	384,35	384,35
Svøríki	**Króna** ..	103,42	103,32
Noreg	**Króna** ..	98,30	98,30
Frakland	**Frankur** .	112,88	112,90
Belgia	**Frankur** .	18,670	18,670
Sveits	**Frankur** .	443,30	444,30
Holland	**Gyllin** ...	341,05	341,00
Italia	**Liri**	0,5143	0,5138
Finnland	**Markur** .	159,15	159,00
Ísland	**Króna** ..	10,60	10,60
Eysturríki	**Skillingur**	54,640	54,640
Spania	**Pesetas** .	6,174	6,163
Portugal	**Escudos**	4,3870	4,3950
Kanada	**Dollari** ..	51310	506,50
Japan	**Yen**	4,3945	4,4170
Írland	**Pund** ...	1025,50	1025,00
Grikkaland	**Drakmur**	3,5750	3,5770

Kelda: Føroya Sparikassi

STÓRUR BYGNINGUR VIÐ LAGALIGUM LÁNUM

- til sølu, leigu ella leigu við forkeypsrætti!





Nú kann títt virki, stovnur ella handil veruliga gera kvetti. At fáa í boði ein spildur nýggjan vælbygdan bygning sum liggur sera væl fyri - við góðum útsýni, tað fært tú ikki hvønn dag.
Les punktini niðanfyri og tú ásannar at møguleikarnir eru ófatuliga stórir við hesum spildurnýggja bygningi og grundøkinum sum hoyrir til.
Hevur tú hug at síggja bygningin, geva boð ella leiga hann mgl. við forkeypsrætti, so ring beinanvegin til Bilcentrið og tosa við Derek - tað loysir seg.

* Bygningurin er 2.000 m² til støddar í 2½ hædd. Bygningurin er sera brandtryggur, øll konstruktiónin eisini takið eru berandi betongelement.
* Grundøkið er 3.000 m² til støddar.
* Bygningurin liggur sera væl fyri, á Hoyvíksvegi 61, beint við har Føroya Banki skal byggja sín nýggja bygning, Bileftirlitið, Posthúsið, grunnarnar og aðrar almennar stovnar.
* Bygningurin er sera lættur at broyta innrætting av um ynskist, til dømis kunnu lættliga fáast 1200 - 1400 m² skrivstovuhøli ella annað, umframt verkstað, burtur úr bygninginum.
* Allir skilaveggir eru brandtryggir DEKO veggir, ljósir og sera lættir at flyta.
* Lætt er at koma inn í bygningin hjá rørslubrekaðum. Klárt er eisini at montera elevator millum hæddirnar.
* Stórt parkeringsøki er við bygningin.
* 2.615 m² stórt byggiklárt grundøki við síðuna av Brunatryggingini hoyrir til.

Pf. Bilcentrið
TLF. 15800